

# Jarnbreyt undir Hestbjørgunum

*Verður tað, sum Birgir Enni ætlar, skal bera til at ganga runt oynna Hest fram við sjónum. Ætlanin er stórfingin men ikki ómøgulig, heldur maðurin við teimum nógvu hugskotunum*

Mynstrið í berginum er sera áhugavert — Mynd: Edvard Joensen

Edvard Joensen

Birgir Enni gongur við ætlanum um at gera tað gangandi fram við sjónum runt oynna Hest. Sjálvandi við vaksandi ferðavinnuni fyri eyga. Ætlanin skal gerast veruleiki við at leggja jarnbreytaskinnarar og rennistreingir har, gangandi ikki er, frá náttúrunar hond.

Ætlanin við hesum stórsligna hugskotinum er, at tað skal bera til at vitja bjørgini fyri vestan alt árið. Eisini tá veðurlíkindini eru soleiðis, at ikki slepst til við báti.

Tá skal kunna gangast úr bygdini og soleiðis njóta tað stórbæra umhvørvið, har er.

Tað ljóðar satt at siga rættiliga fantastiskt, tá ein fyrstu ferð hoyrir hugskotið um at ganga runt oynna. Vestantil er oyggin bert berg, og har skuldi verið ómøguligt at gingið framvið.

Men veruleikin er kortini, at tað er rættiliga stórt øki, har gangandi er, sum er. Og við eini hampiligari íløgu eigur at bera til at koma runt, heldur Birgir Enni.

Birgir Enni hevur í fleiri ár gjørt túrar undir Hestbjørgini við Norðlýsinum. Serliga hava tað verið túrarnir inn í gjáirnar vestanfyri, sum hava drigið fólk.

Hesar ferðirnar hava drigið onnur hugskot fram, og so hvørt sum kunnleikin til økið er vaksin, eru nýggjar ætlanir búnaðar.

Oyggin er soleiðis vorðin fyri vestan, at stórar hellur og røkur eru, sum gangandi er eftir. Veldug loft eru at fara undir, og gangandi er eisini niður úr erva onkrastaðni. Tá allir hesir møguleikar verða lagdir saman, vísir tað seg, sigur Birgir Enni, at gangandi er longu frá náttúrunar hond kring stóran part av oynni. Verður so hjálp til, har gjáir og aðrar forðingar eru fyri, eigur at bera til at koma runt alla oynna til gongu, heldur hann.

Birgir Enni vísir á, at tað eru slíkar ferðir, fólk vilja hava í dag. Og júst her eru møguleikarnir rættiliga góðir. Hestur liggur stutt frá høvuðsstaðnum. Skjótt er at koyra til Gomlurætt, og haðani er eingin teinur út í Hest.

Verður tað, sum Birgir Enni hugsar sær, skal bera til at fara til gongur úr bygdini suður við bakkanum. Á Hælinum skal farast niður á helluna og síðan er gangandi rættiliga langt norður aftur vestanfyri. Gjáirnar, har siglt verður við gummibátunum hjá Norðlýsinum, kunnu so vitjast úr erva, um til dømis jarnbreytarskinnarar verða boltaðir í bergið og soleiðis nýttir til búgv. Til dømis hevði tá borið til at gingið heilt inn í Tronguhjógv og út aftur í Klæmintsgjógv. Har er jú opið gjøgnum oynna.

Bara mynstrið í grótinum í berginum er ein túr vert. Fyri ikki at tala um alt tað lív, har er um summarið, sigur Birgir Enni.

Veturin kann sanniliga eisini vera stórsligin undir bjørgunum. Og tað er júst her, hugskotið hjá Birgiri kemur til sín rætt. Tí allastaðni, har gongt er, ber til at ganga fríur av brimi.

-So hví ikki bjóða fólki út í Hest at síggja brim úr erva, tá soleiðis er? spyr Birgir.

Tað er greitt, at slík ætlan kostar pengar. Men Birgir Enni er av teirri áskoðan, at hetta er so øðrvísi enn alt annað, vit kenna frá ferðavinnuni, at tað eigur at verða roynt. Og hann metir ikki, at tað skal tann heilt stóra íløgan til. Hann vil tó ikki nevna nakað ávíst tal kortini, men metir, at tað er ikki størri íløga enn so, at hon kann fáast innaftur, tá fólk fara at brúka hana.

Birgir Enni vísir á, at alla tíðina, hann hevur siglt við Norðlýsinum, hevur vinnanment seg, so hvørt sum hugskotini eru komin. Viðhvørt hava tey tókst heldur ør at byrja við, sigur hann, men tá tey so hava verið roynd, hevur tað mangan víst seg at verða »succes«.

So hann metir sjálvur, at tað fer at bera til við góðum vilja og fíggjarligum íløgum at gera hugskotið um at ganga kring Hest til veruleika.

# Spennandi fornleivdir á Sandi

*Spennandi leivdir frá gamlari tíð eru komnar undan kavi í bakkanum Heima á Sandi. Fornfrøðingar kanna nú, hvat tað kann vera, sum her er við at koma fram í ljósið*

Edvard Joensen

Fornfrøðingarnir grava dúgliga í bakkanum Heima á Sandi. Fólk hava varnast, at steinsetingar eru komnar undan, so hvørt sum lopið er burtur úr bakkanum. Bæði undir Høgnamørk og Junkarafløtti eru áhugaverd ting funnin, sigur Símun Arge, fornfrøðingur á Føroya Fornminnissavni.

Turra veðrið í summar hevur gjørt, at sandurin er so lættur, at hann ikki liggur, men fýkur omanav. Hetta hevur so avdúkað øskufláir, har funnin eru bæði djóra- og fuglabein, sigur Símun Arge. Eisini hava fornfrøðingarnir funnið hitasprongt malargrót, sum kundi bent á búseting.

Men Símun Arge sigur, at einki er staðfest enn, og tí vil hann einki siga fyri vist. Hann veit enn ikki at siga, um talan er um búseting sum so, ella bara talan er um ein øskudunga, har burturkastið er blakað. Heldur ikki vita fornfrøðingarnir fyri vist, hvussu gamalt tað er, sum teir nú hava funnið.

Tað verður kannað sum skjótast, sigur Símun Arge.

Hann sigur, at hetta, sum nú kemur undan, líkist rættiliga nógv tí, teir fyrr hava funnið í bakkanum yviri á Sondum. Har varð í 1994 grivið, og funnu tey tá bústaðarfláir í fýra-fimm umførum. Tað var greitt, at har hevði fólk búð. Var so flutt burtur og síðan afturkomið.

Enn eru eingir brúkslutir funnir, sum greitt kunnu vísa á búseting, sigur Símun Arge. Men umráðið má kannast og tíðarfestast beinanvegin, sigur hann. Tí hann væntar ikki, at tað fer at liggja veturin av, soleiðis sum náttúran er farin við bakkanum higartil.

Og júst nátturan sjálv hevur avdúkað annað áhugavert í bakkanum á Sandi. Undir Høgnamørk eru laðaðir veggir komnir undan, har bakkin er lopin.

Símun Arge metir eisini hetta sum sera áhugavert. Talan er um veggir, sum líkjast. Men líkt er kortini ikki til, at teir eru frá sama bygningi.

Hann sigur, at tað tykist løgið, at einki gólv er millum veggirnar, og at heldur eingin øska er funnin. Men fornfrøðingarnir hava sett sær fyri at kanna økið nærri.



Undir Høgnamørk hava teir funnið laðaðar veggir — Mynd: Edvard Joensen






○ Mads Petur ▲ Katrina ♦ Jónhild

# Báðir hvalirnir norðanfyri

Bæði Katrina og Mads Petur eru nakað norðan fyri Føroyar. Í løtuni eru hvairnir tætt við hvønn annan. Jónhild gavst at senda heim eftir ólavsøku, men enn veit eingin hvat er hent. Hon var nakað eystanfyri, tá hon seinastu ferð ringdi heim tann 30. juli.

Í grind herfyri varð staðfest, at Ísak hevur mist sendaran. Nú eru so bert tveir hvalir, ið regluliga ringja heim til kanningarfólkini.

Í komandi viku fæst eisini vissa fyri, um sendarar eru festir á hann ella hon hvalir. Tað sigst, at honhvalir eru meira sosialir og halda seg til bólkin, meðan hannhvalir svimja meiri fyri seg sjálvar. Men hetta fæst greiðu á, tá úrslitini koma í næstu viku.

# Vestlaks svimur frá hinum

*Tá avtalan millum Vestlaks og norska Pan Fish kemur undir land, gerst Vestlaks so nógv tann størsti alirisin í Føroyum*

Dia Midjord

Hóast ætlanin hjá Pan Fish og Vestlaks at býta fifty/fifty fór í vaskið, so samstarva feløgini víðari. Arbeitt verður í løtuni at víðka samstarvið, so tað gagnar báðum pørtum og er innan fyri lógarinnar karmar.

Nýggja avtalan førir við sær, at Vestlaks saman við Pan Fish skal reka átta alipláss. Feløgini Laksaaling, Sílaaling og Norðaling eru komin aftrat við nýggju avtaluni.

**Á laksatoppinum**

Í dag er Vestlaks risin í føroyskari alivinnu. Nú Oyndarfjørður er komin aftrat, hevur Vestlaks aktivitet á átta plássum. Faroe Salmon í Klaksvík hevur næst mestu framleiðsluna og hevur aktivitet á fýra plássum.

Endamálið við samanleggingini er, at bæði Vestlaks og Pan Fish skulu fáa meira burtur úr á ymsu plássunum. Og tá fleiri alipláss verða rikin undir sama taki, ber til at leggja stilt einastaðni og flyta laksin aðrastaðni. Á henda hátt ber til at leggja okkurt alipláss brakk, so tað kann reinsast eitt sindur fyri dálking.

**Eru givin**

Ein avleiðing av samstarvinum millum Pan Fish og Vestlaks er, at Kryvjivirkið í Oyndarfirði varð niðurlagt í februar mánaði, og maskinurnar fluttar til Fuglafjarðar.

Fleiri av arbeiðsfólkunum, ið arbeiddu í Oyndarfirði, kryvja í dag í Fuglafirði. Men nøkur teirra, serliga mammur í Oyndarfirði, ið ikki so væl kundu flyta úr bygdini, hava mist arbeiðið.




ÚTSØLA

byrjar fríggjadagin
4. aug. kl. 08.00

ALT
1/2 prísur

NOA NOA
TRANSIT PAR-SUCH
FLYING A
TONE BARKER

Opið er til kl. 19.00

29
Í Tróndargøtu
tel. 31 82 00
ella 21 81 99